**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI PARTIN AV KARLAMAGNUSARBREYT ÍMILLUM RÓLANTSGØTU OG ÓLIVANTSGØTU**

**SB_Hoyvík_Karlamagnusarbreyt_2015_1_2021**

Parturin av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu var ovasti partur av serstøku byggisamtyktini, sum hevur til endamáls at skipa Karlamagnusarbreyt sum eitt miðstaðarøki fyri Hoyvík.

Politiski mynduleikin í Tórshavnar kommunu hevur tikið avgerð um minka miðstaðarøkið, og í staðin skipa hendan partin av Karlamagnusarbreyt til bústaðarøki við tilsamans 12 grundstykkjum til sethús á millum uml. 375 $m^2$ og uml. 560 $m^2$.

Skipanin av økinum er sambært ásetingunum í hesum tekstskjali og kortskjali 1.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til bústaðarbygging.

1.2 at tryggja, at staðsetingin og tal av grundøkjum verður sum sýnt í kortskjali 1.

1.3 at skipa tilkoyring og parkeringspláss til økið.

1.4 at áseta stødd og hædd av sethúsum

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og fevnir um matr. nr. 135nl, 135nm, 135nn, 135no, 135np, 135nq, 135nr og 135ns, Hoyvík.

2.3 Økið er uml. tilsamans 7.600 $m^2$ til støddar og liggur í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu byggjast 12 sethús og felags parkeringspláss til tilsamans 12 bilar sambært kortskjali 1.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Húsini skulu byggjast innanfyri byggifeltini.

4.2 Mest loyvda hædd á húsum er 7 m frá lidnari planering.

4.3 Mest loyvda byggistig 0,3

4.4 Mest loyvda nýtslustig 0,6

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

5.1 Innkoyringar sambært kortskjali 1.

5.2 Felags parkeringspláss til 12 bilar sambært kortskjali 1, umframt parkeringspláss til tveir bilar inni á hvørjum av teimum einstøku grundstykkjunum.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Tey viðurskifti, sum ikki eru viðgjørd í hesi byggisamtykt skulu viðgerast eftir almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

8.2 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.3 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 21/16272 |
| Ætlanarskriv: | 23/11-2021 |
| Góðkent: | 2/12-2021 |
| Váttað: | H Poulsen |

**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri partin av Karlamagnusarbreyt millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu | | | | |
| **Undirheiti** | Kortskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:600 | | | | |
| **Dagur** | 23.11.2021 | **Journal** | 21/02442 | **Tekna** | RVH |